





# Ljósafelli fer til Eysturgrønlands

**Á seinasta túrinum var Ljósafelli á kongafiskaveiði í Irmingarhavinum, har teir royndu við fótitroli. Hetta var ein hampiliga góður túrur. Teir fingu 415 tons í tveir mánaðir**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*





*Ingolf Rasmussen, skipari, sigur, at Ljósafelli hesaferð verður gjørdur út til ein túr, sum kann vara upp til tríggjar mánaðir. – Men eg ivist kortini í, um vit verða burtur so leingi, tí kvoturnar eru ikki so stórar, sigur hann*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í kvøld fer trolarin, Ljósafelli, ætlandi til Eysturgrønlands at royna eftir svartkalva og partvís kongafiski. Hendan túrin fara teir at royna við botntroli.

Skiparin, Ingolf Rasmussen, sigur, at reiðaríið hevur keypt svartkalvakvotu frá hvalbiartrolaranum, Niels Paula, og haraftrat eigur og hevur Ljósafelli eisini keypt nakað av kongafiski, sum teir ætlandi eisini fara at leggja seg eftir hendan túrin.

Hann vísir á, at svartkalvin vanliga stendur djúpri enn kongafiskurin, og tí fara teir á túrinum eisini at royna á ymiskum dýpum.

– Vanliga stendur svartkalvin niður á 1000 metra dýpi, meðan kongafiskurin vanliga fæst niðri á umleið 600 metrum.

Ingolf sigur, at kongafiskurin saktans kann standa djúpri og svartkalvin grynri.

– Verður roynt ímillum hesi dýpir, er ofta bæði svartkalvi og kongafiskur í hálinum, sigur hann.

## Langur túrur

Skiparin sigur, at skipið verður gjørt út til ein túr, ið kann vara upp til tríggjar mánaðir, men hann ivast kortini í, um teir verða burtur so leingi, tí kvoturnar eru ikki so stórar.

– Men er skipið gjørt út til ein slíkan túr, kunnu vit kanska fara onkra aðrastaðni at royna, men tað verður so framvegis inni á landgrunninum – og ikki í Irmingarhavinum hendan túrin, sigur Ingolf.

Umborð á Ljósafelli fara teir at skráskera svartkalvan og kongafiskin, sum verður seldur í Evropu og til londini eystanfyri.

## Seinni í ár

Ingolf Rasmussen veit ikki at siga, hvat Ljósafelli fer at gera seinni í ár, tá ið teir koma aftur úr Eysturgrønlandi.

– Reiðarin hevur onkrar følarar úti, og hugsað verður eitt nú um at keypa kvotu ella býta um kvotu.

Skiparin sigur, at enn er ikki gjørt av, hvagar skipið fer eftir túrin í Eysturgrønlandi.

Við Ljósafelli hendan túrin verða 27 mans, og skipari verður Ingolf Rasmussen og hvalbingurin, Dánjal Jákup Berg, verður stýrimaður.

Maskinstjóri umborð er Sámal Johannesen, sum hevur siglt við Ljósafelli í nógv ár.

## Seinasti túrur

Á seinasta túrinum var Ljósafelli á kongafiskaveiði í Irmingarhavinum, har teir royndu við fótitroli.

Hetta var ein hampiliga góður túrur. Teir fingu 415 tons í tveir mánaðir.

Reiðarin á Ljósafelli, Mortan Johannesen, sigur, at tað ger góðan mun, at prísurin á skráskornum kongafiski er øktur eina krónu fyri kilo í ár.

# Sosialurin betur lisin umborð

**– Vit printa SkipsSosialin út og leggja hann í messuna, har hann verður væl lisin – betur enn heima. Eg vil siga, at SkipsSosialurin er ógvuliga populerur umborð, sigur Ingolf Rasmussen, skipari á Ljósafelli**

LJÓSAFELLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- SkipsSosialurin er ógvuliga populerur umborð á Ljósafelli, sigur skiparin, Ingolf Rasmussen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Á seinasta túri fekk manningin á Ljósafelli, sum telir 27 mans, fyri fyrstu ferð SkipsSosialin umborð.

Skiparin á Ljósafelli, Ingolf Rasmussen, sigur, at teir teknaðu seg fyri at halda SkipsSosialin, og hetta er manningin ógvuliga fegin um.

## Liggur í messuni

– Nú er hetta so ógvuliga nýtt hjá okkum, at eg dugi ikki at seta orð á hvørja av skipanunum, sum Sosialurin bjóðar, vit hava. Men skipanin riggar ógvuliga væl, og manningin er ovurfegin um at kunna lesa tíðindi í Sosialinum hvønn blaðdag.

Ingolf sigur, at SkipsSosialurin kemur í teirra postkassa á telduni, sum hann tekur til, og síðan verður blaðið printað út í einum ella fleiri eintøkum og lagt niður í messuna.

– Tað er ikki altíð, vit printa allan SkipsSosialin út, men hevur manningin hug at síggja og lesa tað, ið eftir er, kunnu teir fara inn á telduna, har øll útgávan liggur.

## Populerur umborð

Skiparin sigur, at SkipsSosialurin verður nógv betur lisin umborð á Ljósafelli, enn blaðið verður lisið, tá ið menn eru heima.

– Eg vil siga, at SkipsSosialurin er ógvuliga populerur umborð, og vit eru ógvuliga fegnir um hesa loysnina, vit hava fingið við Sosialin.

Ingolf sigur, at teir hava ikki havt útbúnaðin umborð áður, soleiðis at teir kundu fáa fatur á SkipsSosialinum.

– Men nú er hetta komið uppá pláss, og tað er eitt stórt framstig fyri manningina, sum er leingi burtur í senn, sigur hann.

## Góð loysn

Hann vísir á, at teir fáa fatur á SkipsSosialinum um vanliga internet-sambandið, sum teir nú hava fingið, og hann heldur, at hetta er ein góð loysn og rættiliga rímilig loysn í prísi.

– Vit kunnu mæla øllum øðrum skipum, sum ikki longu fáa SkipsSosialin umborð, til at fáa hetta í lag, sigur Ingolf Rasmussen, skipari á Ljósafelli, at enda.